# VIÐMERKINGAR

SAMBAND
EIRIKUR LINDENSKOV
EIRIKUR@SOSIALURIN.FO
TLF 341800

## Flogvallarmálið má ikki skrumblast ígjøgnum

Tað er ikki sørt ørkymlandi at hoyra ymsu útsagnirnar um flogvøllin – um tað er skilagott at útbyggja í Vágum, ella um vit eiga at leggja á annan bógv og fyrireika bygging av nýggjum flogvølli aðrastaðni í landinum.

Men tað skertst ikki burt, at kjakið koyrir á einum løgnum spori. Sum leikfólk er ikki lætt at skilja í millum ymsu motivini – og motivini, ið summi hava at skjóta øðrum motiv í skógvarnar.

Í síðstu viku var mikil orðadráttur um, hvørt leiðslan í flogfelagnum hevði givið flogskiparunum munnkurv, so teir ikki sluppu at úttala seg. Hetta var kortini víst aftur – og fríggjadagin kom so Flogskipararfelagið við sínari útmelding, sum afturvísir, at tað er skilagott at byggja út í Vágum.

Hetta eigur sjálvandi at geva høvi til umhugsan hjá teimum, sum skulu taka avgerðirnar. Vit kunnu sjálvandi ikki vita, hvørja vitan løgtingsfólk hava fingið, men um vit meta út frá orðaskiftinum, so tykist ikki, at vitan teirra er serliga kvalifiserað – og kjakið er á einum ósømiliga lágum støði.

Tað er væl skiljandi, at vágafólk meta hesa útbyging – og varðveitslu av flogvøllinum í oynni, sum eitt útjaðaramenningarprojekt. Hesum kunnu vit eisini fylgja, men til eitt vist. Um so er, at sakkunnleikin metir, at rættast er at fyrireika ein nýggja flogvøll aðrastaðni í landinum – og um so er, at ein frágreiðing um hetta er á gáttini, so er tað illa skiljandi, at løgtingið ikki vil bíða eftir eini slíkari.

Ein nýggjur flogvøllur hevur so ómetaliga stóran týdning fyri alt samfelagið og fyri menningina av landinum, at hetta kann ikki nýtast sum politisk kastibløka. Tað er tí eitt krav til Føroya Løgting, at hetta málið fær tað viðgerðina, sum tað hevur uppiborið og ikki verður skrumblað ígjøgnum í óðum verki, bara tí at summi tingfólk vilja eina ávísa loysn.

**Sosialurin**

## Real Føroyar

**KÁRI Á RÓGVI**
løgtingsmaður
Sjálvstýrisfloksins



**Eftir seinna kríggj kom Marshal-hjálpin Føroyum til góðar millum annað við at stovna Realin. Sjálvstýrisflokkurin vil nú á sama hátt seta gongd á búskap og fíggjarkervi**

Í mangar mátar er støðan nú tann sama sum í 50'unum; frammanundan var gulltíð, hvørs møguleikar vóru forsømdir, bygnaðarbroytingar ikki framdar, og uppspardur vinningur gloppin bæði tí almenna og vinnuni av hondum. Men betri er bøtandi hond. Í november 1954 legði forsætisráðharrin fram uppskot á fólkating um at skipa føroyska realkreditstovnin, ið eisini løgtingið einmælt tók undir við. Ætlanin var upprunaliga, at tríggir fíggjartættir skuldu vera í stovninum: bústaðafígging, almenn fígging og skipafígging. Men av ymsum áðum var byrjað við skipafígging.

Sjálvstýrisflokkurin hevur tikið henda táttin uppaftur. Í valskrá okkara, sum kom fram til valið 2008, stendur: “Realkredittur skal skipast at tryggja støðugt ódýra sethúsafígging.” Í summar sendu vit uppskot til hoyringar ið nú er lagt fram á ting. Fleiri tøkniligir spurningar er í hesum máli, sum fara at verða lýstir neyvari sum frá líður, men stevnan er greið.

Orðið ‘real’ sipar til veruligar naglafastar ognir sum jørð, bygningar og skip. Realkredittur hevur ta frálíkum skipan, at kreditvirðini hjá mongum ið skylda verða løgd saman, og váðin hjá mongum útlánarum verður spjaddur. Heldur enn at fáa innlánsprógv fært tú sum sparari lánsbræv; pengarnir kunnu ikki takast út sum úr banka, men lánsbrævið kann seljast. Sum sparari fært tú gjaldføri sum við valigari bók, men rentu sum við uppsøgn. Fyri sethúsaeigaran merkir hetta drúgva afturgjaldstíð við lágari rentu. Hesar treytir kunnu skipast á mangan hátt, og fortreytir er mangar at fáa uppá pláss; men tá ið skipanin riggar, hevur hon lagaliga fígging við sær eins væl og góðar íløgumøguleikar.

Fleiri ivast í, um til ber at skipa føroyskan realkredit til bústaðafígging. Serliga hava tey víst á, at tær lánsbrævaseriur ið seljast skulu kunnu gerast ov fáar og smáar til at vera nóg gjaldførar og nóg lagaliga rentaðar. Men longu verandi realkreditfígging av sethúsum byggir á, at bankar hefta fyri formidlaði lán – gera teir tað sama fyri tey føroysku, fáa føroysku lánsbrøvini somu rating sum bankarnir. Vit kunnu eisini sum við Realinum lata lánsbrøvini fáa alment veðhald at byrja við.

Harumframt hava vit í Føroyum sera nógvar stovnar við nógvum gjaldføri og serligum kunnleika til føroysku marknaðin, fýra vanligar pengastovnar, Realin, ALS, Samhaldsfasta og sera mangar aðrar grunnar við nógvum gjaldføri, sum kunnu meta lánbrøvini. Umframt teir eigur landið gjaldføri í landsbanka – og ikki minst húsalánsgrunni, hvørs endamál ger hann serliga upplagdan at lata stovnsfæ og annars tryggja at lánsbrøvum gjaldføri.

**Vinnan nýggja Marshalætlan**

Verandi lóg um Realin hevur áseting um, at við kunngerð kann farast undir at fíggja aðrar vinnur. Millum mest spennandi perspektiv í realkreditti er helst at umskipa bygningsskuld hjá vinnulívi í Føroyum frá heldur stuttari og dýrari fígging til uppá seg langfreistaða og ódýra fígging.

Sjálvstýrisflokkurin vil hava løgtingið at samtykkja, at neyðugar lógarbroytingar skulu fyrireikast, so vit kunnu taka næstu stigini í føroyskum realkreditti; og sum Johan Poulsen segði á fólkatingi tann 25. februar í 1955 um víðkanina av føroyskum realkreditti til at fíggja annað enn skip: “Må jeg... udtale ønsket om, at de bebudede lovforslag må blive framsat snarest muligt.”

## Perlan er sanniliga eitt gott íkast

**FRÍÐÁLVUR JENSEN**



**Takk til tykkara, sum hava givið tykkara til, at vit nú hava fingið enn eitt gott spælistað og ein mentanarligan karm!**

At tað kann gerast betri er altíð ein spurningur um prioritering, men eg eri sera fegin um, at vit hava fingið ein góðan og prýðiligan karm til okkara spírandi tónleik og tað mentanarliga virksemi, sum vit eiga her í høvuðsstaðnum og kring oyggjarnar.

Tíðirnar eru ikki so bjartar í løtuni, men eftir myrkrið kemur sólin aftur undan kavi, og eg eri vísur í, at úr kreppuni og tí negativa, vit eru fyri, fer at koma eitt enn betri, íkast til fantastiska tónleika- og mentanarlívið, sum fer at føra okkum longri fram á leiðini.

Tað er ómetaliga gott, at røddir eru í politisku skipanini, sum síggja nakað í hesum og sum vit fara at njóta gott av – takk fyri!

Vit eru líkasum á eini ferð, har tilgongdin er sera jalig og gevandi, og tað skulu vit bara fegnast um.

Røddir eru, sum halda, at tað átti at verði gjørd størri rúmd fyri hesum, men eg eri ikki í iva um, at tá búskaparliga rúmdin er til staðar, fara vit at síggja enn fleiri ambitiøs projektir á tónleikaliga- og mentanaliga økinum.

**Takk fyri og Gleðilig Jól!**

**Sosialurin**

**Sosialurin**
Stovnaður: 1927
**Ábyrgdarblaðstjóri:** Jan Müller
jan@sosialurin.fo
**Blaðstjóri:** Eirikur Lindenskov
eirikur@sosialurin.fo

**Marknaðardeild:** lysing@sosialurin.fo
**Marknaðarleiðari:** Finnbjørg Nattestad finnbjorg@sosialurin.fo
Høgni Thomsen hogni@sosialurin.fo
Elin Vatnhamar Olsen evo@sosialurin.fo
Svein Rógvi Nielsen Ljósstein sveinrogvi@sosialurin.fo

**Blaðfólk:**
Áki Bertholdsen aki@sosialurin.fo
Vilmund Jacobsen vilmund@sosialurin.fo
Inna Törnroos inna@sosialurin.fo
Magnus Gunnarsson maggi@sosialurin.fo
Rigmor Dam rigmor@sosialurin.fo
Leo Poulsen leo@sosialurin.fo
Eyðun Klakstein eydun@sosialurin.fo
Árni Joensen arni@sosialurin.fo
Anna V. Ellingsgaard anna@sosialurin.fo
Rógvi Nybo rogvi@sosialurin.fo
Eirikur í Jákupsstovu eij@sosialurin.fo

**Ítróttur:**
Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo

**Myndamenn:**
Álvur Haraldsen alvur@sosialurin.fo
Jens Kristian Vang jensk@sosialurin.fo

**Kykmyndir:**
Alvin Elleby Andersen alvin@ras2.fo

**Sosialurin í Norðoyggjum:**
Nólsoyar Pálsgøta 1, 700 Klaksvík
tel. 458686 fax 458687
e-post: klaksvik@sosialurin.fo

**Sosialurin í Suðuroy:**
tel. 375364 fax 375464
tel. 228814
e-post: aki@sosialurin.fo
e-post: dagfinn@sosialurin.fo

**!!! Haldarar**
sum ikki hava fingið blaðið, kunnu ringja til 341818 frá kl. 8.00-20.00 og boða frá

**Uppseting/prent:**
Uppseting: Sosialurin
Prent: Prentmiðstøðin
**Útgevari:**
Sp/f Sosialurin
**Avgreiðsla:**
Mán.-frí. 8-16
Tórsgøta 1, 100 Tórshavn
Tel. 341800, Fax 341801
**Postadressa:**
Postboks 76, 110 Tórshavn
**E-mail:**
post@sosialurin.fo
lysing@sosialurin.fo
lysingartorg@sosialurin.fo
varp@sosialurin.fo

Blaðið verður prentað mánadag-fríggjadag klokkan 13[30]

**Lýsingar**

| **Freistir:** | Tekstlýsingar | Størri lýsingar | Lýsingartorgið | Heilsanir |
|---|---|---|---|---|
| Mánadagsblaðið | Mán.kl. 10 | Frí. kl. 15 | Frí. kl. 12 | Frí. kl. 12 |
| Týsdagsblaðið | Týs. kl. 10 | Mán. kl. 15 | Mán. kl. 12 | Mán. kl. 12 |
| Mikudagsblaðið | Mik. kl. 10 | Týs. kl. 15 | Týs. kl. 12 | Týs. kl. 12 |
| Hósdagsblaðið | Hós. kl. 10 | Mik. kl. 15 | Mik. kl. 12 | Mik. kl. 12 |
| Fríggjadagsblaðið | Frí. kl. 09 | Hós. kl. 15 | Hós. kl. 12 | Hós. kl. 12 |

Størri lýsingar, sum nógv arbeiði stendst av, mugu vera inni í góðari tíð og áðrenn ásettu freistir.
Framíhjápláss má umbiðjast í góðari tíð.

**Stødd:**
Ein heil síða í Sosialinum er 254 mm breið og 346 mm í hædd. Breiddin á einum teigi er 39 mm og rúmið millum teigarnar er 4 mm.

**Innsent tilfar**
Fult navn skal vera undir innsendum tilfari. Innsendar greinar, har blaðleiðslan ikki er kunnað um bústað og telefonnummar, verða ikki settar í blaðið.